gult12 cyan12 magenta12 svart12



IL(L)A sperdur útróðrarmaður:

# Rýmir undan ILA




*Ein partur av bryggjuni er avbyrgdur, so forðast kann fyri smittuvanda. Vanligir útróðrarbátar, sum skulu út av fjørðinum skulu sóttreinsast fyrst*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Funningsfjørður er stongdur, og bara brunnbáturin sleppur ótarnaður at føra sjúka alilaksin til Oyndarfjørð, har hann verður avtikin. Útróðrarbátar í fjørðinum mugu fara til Eiðis, um teir framvegis skulu rógva út**

ILA
*Stefan í Skorini*

Longu mikudagin varð farið undir at taka laksin úr ringunum hjá Funningslaks uttast í Funningsfirði. Hósmorgunin løgdu menn til brots longu klokkan fýra við at tøma tann eina ringin.

Laksurin verður førdur til Oyndarfjørð, sum er ILA rakt øki. Avtala er fingin í lag við Vestlax, sum tekur sær av laksinum. Fyri stuttum var alibrúkið í Oyndarfirði rakt av ILA, og tað er tí tilbúgvið at taka ímóti sjúka laksinum. Sjúki laksurin verður tikin av brunnbáti, ið siglir ímillum Funningsfjørð og Oyndarfjørð. Laksurin verður tikin úr brunninum, men sjógvur skal ikki flytast millum økini, og tí verður brunnurin ikki tømdur.

### Rýmir til Eiðis

Funningsfjørður er nú stongdur fyri allari ferðslu fyri at forða fyri, at ILA breiðir seg til onnur alibrúk, men tað vísir seg at vera torført at hava tamarhald á sjúkuni. Myndugleikarnir eru tí ógvuliga ræddir um sjúkan skal breiða seg um allar geilar í Føroyum.

Útróðrarmaðurin Erling Hansen eigur ein AWI 27 útróðrarbát, sum liggur í Funningsfirði. Hann hevur fingið boð frá landsdjóralæknanum um, at skal hann út við bátinum, má hann fyrst sóttreinsast. Hann kann heldur ikki taka fiskin upp í Funningfirði, sum hann annars plagar.

Nú verður hann noyddur at fara til Eiðis, har hann roynir at fáa pláss fyri bátinum. Erling sigur, at hetta kemur ógvuliga illa við hjá honum sum útróðrarmanni, men hann sigur í sama viðfangi, at ikki eru tað nógvir útróðrarmenn av hansara slagi í bygdini, og tí rakar tað ikki so hart.

Erling hevur fingið útgerð at sóttreinsa bátin við, og tí kann hann halda leiðina út av fjørðinum, sum nú er raktur av ILA, men hann kemur kanska ikki aftur í bræði. Hann ásannar, at einki annað er at gera enn at lýða tey harraboð, ið hann fær.

### Óttast ILA

At myndugleikarnir eru ræddir fyri sjúkuni, sum seinastu mánaðirnar hevur gjørt innrás í Føroyum, sæst týðuliga í teimum plássum, har sjúkan er staðfest ella illgruni er um tað.

Í Funningsfirði er ein partur av bryggjuni avbyrgdur, og har stendur útgerð til sóttreinsan. Eisini fóru menn beinanvegin til verka við at tøma ringin, sum skal hava ILA, tá illgrunin stóðst.

Fólk í føroysku og norsku vinnuni hava víst á, at myndugleikarnir gera ov nógv av, tá ILA skal basast. Víst verður í hesum sambandi á, at ILA er ikki eitt vandamikið virus, og tað er nakað, vit eiga at læra okkum at liva við.

Hetta taka myndugleikarnir eftir øllum at døma ikki til eftirtektar, men gera alt fyri at beina ILA-virusið burtur úr Føroyum. Hendingarnar seinastu vikurnar í Eysturoynni benda ikki á, at tað fer at eydnast teimum.



*Útróðrarbátar í Funningsfirði og á øðrum firðum, har ILA er staðfest, mugu finna annað pláss at rógva út og forvinna til dagligt breyð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fyribils staðfesting av ILA

**Ein av eigarunum av Funningslaksi, Kári Nielsen, sigur, at teir hava fingið eina fyribils staðfesting av ILA sjúkuni úr Noregi mikukvøldið. Hann heldur, at fiskurin eigur at verða tikin beinanvegin, so støðan ikki gerst eins álvarsom og í Fuglafirði í fjør**

ILA-SJÚKAN
*Stefan í Skorini*

Peter Østergaard frá landsdjóralæknanum bar mikukvøldið tey tíðindi, sum tey flestu hava væntað, at talan er um ILA í einum av ringunum hjá Funningslaksi. Laksurin verður tískil tikin og beindur til Oyndarfjarðar, har hann verður slaktaður.

Kári Nielsen metir støðuna at vera álvarsama, og tí má fiskurin takast beinanvegin. Hann heldur ikki, at vinnan hevur nakran áhuga í at fara lætt um henda smittuvandan.



*Alibrúkið, sum er rakt av ILA, og laksurin verður tikin úr ringinum. Enn er bara talan um at taka laksin úr tí eina ringinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Trygging

Alibrúkið er tryggjað móti sjúku, men tryggingin tekur bara við, um laksurin er deyður. Tryggingin tekur ikki við fyri tann fiskin, ið er sjúkur, men tó ikki deyður. Tann laksurin, sum verður tikin livandi, gevur ikki alibrúkinum nakað endurgjald.

Kári metir tó ikki, at ráðiligt er at bíða við at taka laksin, til hann er deyður. Um myndugleikar og alarar drála við at taka tey neyðugu stigini, endar man í eini støðu, sum líkist tí í Fuglafirði, tá einki tamarhald var á.

Kári sigur, at alibrúkini, ið verða rakt av ILA-virusinum, missa nakað av pengi, men tað liggur ikki fremst í huganum í eini slíkari støðu.

Munurin á alibrúkunum í Funningsfirði og tí í Oyndarfirði er, at í ringunum hjá Funningslaksi gongur bæði smátt og stórt, men í Oyndarfirði var tað bara laksur, ið var klárur at taka.

Í Funningsfirði eru tvey alibrúk. Tað, ið er rakt av ILA, liggur uttalaga í fjørðinum, meðan hitt liggur nakað innanvert.

Tá vit høvdu Kára Nielsen í telefonini hósdagin á middegi, upplýsti hann, at enn er bara talan um tann eina ringin, haðani laksur verður tikin vegna ILA. Í løtuni eru fundir millum landsdjóralæknaembætið og Havbúnaðarfelagið, so finnast kann fram til tær bestu loysnirnar.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 27. apríl til hósdagin 3. mai

# Barrin – finalan beinleiðis




*Mánakvøldið verður finalan í sendingini Baren. Tá verður greitt, hvør fer avstað við teimum 500.000 krónunum. Seinasta sendingin verður hildin uttandura, um veðrið loyvir tí, og fleiri enn 500 gestir verða til staðar. Nógv undirhald verður eisini á skránni.*

*Nú eru fáir luttakarar eftir av teimum mongu, sum vóru við, tá sendingin varð send á fyrsta sinni. Hesi bæði skulu kappast hvør móti øðrum um virðislønina, og tað verður spennandi at síggja, hvør gerst ríkur.*

# Vit spyrja bara

*Dagfinn Olsen ummælir:*



Eingin ivi er um, hvat loftmiðlarnir og loftmiðlafólk tókust við í farnu viku. Alt, sum kundi beinast nakrastaðir, fekk boð, kanska serliga tøkniliga arbeiðsmegin. Og úrslitið gjørdist eisini virðiligt.

Vit fingu eina virðiliga, nei, meira enn tað, eina flotta Prix Føroyar finalu. Og útvarp og sjónvarp, ið eisini eru fyrireikarar, syrgdu fyri, at henda stórhending, varð varpað kring landið. Gleðiligt! Tí hetta hendir annars ov sjáldan. Og finalan var við góðum vertum og fáum ella ongum deyðum løtum.

Sjálvur var eg ein, ið upplivdi finaluna í veruleikanum, t.v.s. í Norðurlandahúsinum, men eisini har fylgdu vit sjónvarpinum á stórskíggja (tveimum).

Sigast má, at Prix tiltakið hevur ment seg, eins og samlaða framleiðslan. Sigst, at ÚF hevði betra ljóðið, kanska hevur hetta við tøknina at gera. SvF hevði fingið Herluf Sørensen, ið dagliga starvast hjá DR, heim (aftur) at framleiða sendingina, og tað er gleðiligt, at tað eru løtur, har tað veruliga verður gjørd ein roynd at fáa sum allar mest burturúr og góðar kreftir verða settar inn. Flott!

### Hjáveiða

Hóast stuttu samrøðurnar millum bólkarnar, so er kanska at undrast á, at mentanardeildirnar ikki gera meira við at fáa meira av sonevndari hjáveiðu, tá heili 15 útlendsk tónleikakøn, ummælarar, vertir og ídnaðarfólk, vitja landið. Her var ÚF helst eitt vet frammanfyri SvF, men tað veruliga kjakið, ella veruligi uppfylgjarin til finaluna, hava vit ikki sæð ella hoyrt enn.

Slíkt tiltak krevur alla orku, tað er givið, men saknur er í nøkrum álvarsorðum, nú tøgnin valdar eftir bestu finaluna, ið vit enn hava hoyrt og sæð.

### Annað

Ymsar áhugaverdar sendingar hava verið á sjónvarpsrútinum farnu vikuna. Serliga nógvar dokumentarsendingar, hóast ov nógv av hesum slag óivað ikki savnar breiða hyggjaraskaran.

Bátaferðin hjá føroyingum í norska skergarðinum tykist áhugaverd og myndirnar eru vakrar.

Men enn er tað til stóra irritatión, at vit støðugt verða mint á, at SvF, eins og Sjónvarpsfelagið á sinni var tað, í stóran mun er ein miðil, ið tappar tilfar frá øðrum, til beinleiðis víðari rensl.

Eftir hvørja sending byrjar tónleikur, danskur vertur sigur nøkur orð, til sendimaðurin í Vørðsluni kvikliga dempar í ein minutt ella tveir. Tosaði nakar um sjálvstøðug, stoltleika, fult vald, serstaka mentan og tjóð, sjálvberandi hetta og hatta? Um so er, so játti Sjónvarpinum 5 ferðir tað, ið játtanin er í dag, so gerast kunnu mansømiligar avtalur við støðir aðrastaðir, so vit ikki bert síggja beinleiðis tappaðar sendingar. Og so vit kunnu fáa eitt sjónvarp, ið framleiðir meira av upprunatilfari — hetta kostar!

Tann, ið nú fekk ilt fyri hjartað, átti at hugsað sær støðuna, um støðan hjá ÚF var hin sama. Bandaðar sendingar frá DR allan dag — og so tøgn, meðan danski vertuin líka boðaði frá, hvat næsta sending er!!

Ábyrgdin liggur ikki hjá leiðslu, ella starvsfólki, hetta er ein politiskur spurningur: skulu vit hava eitt veruligt sjónvarp í Føroyum, ella bara eitt, ið stingur høvdið upp yvir vatnskorpuna av og á.

Skemtiligt var eisini at hoyra vælgjørda danan Leth ynskja gleðilgar páskir mánakvøldið (23/4-2001) og sita í sofuni og siga takk somuleiðis, - eina viku eftir páskir!

Útvarpssendingin Spyr Bara kemur eftir øllum at døma ikki aftur. Greið vóru orðini: Spyr Bara verður ikki aftur! Hví? Ein sera væl dámd sending, tykist hetta vera. Men kanska er ætlanin at gevast, meðan leikur er góður. Ella hví? Vit spyrja bara.

## Húshjálp




## Faðirin hjá brúðrini




## Mennandi leikur

*- ein mynd av Linu Larsen*




## Maðurin við jarnmaskuni

